ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

24. juni 2025
J.nr: 25/15229-9
Viðgjørt:

Nr. 52-111/2025

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-111/2025 eftir tingskipanini § 52 a til Eirik í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, frá Hendrik Old, løgtingsmanni, um umvæling av Hamragarði

Spurningar:

1) Hví eru umvælingarnar av røktarheiminum Hamragarði ikki byrjaðar?
2) Nær kann væntast, at arbeiðið verður sett í gongd?

Svar til spurning 1:
Almanna- og mentamálaráðið hevur vent sær til Landsverk og biðið um at fáa upplýsingar til svarið.

Seinasti samráðingarfundur, viðv. semju um byggimálið frá 2011 og viðv. umvælingum, var millum Fíggjarmálaráðið, Landsverk, Almanna- og mentamálaráðið og tær fýra kommunurnar í Suðuroyar sunnaru helvt (Vágur, Porkeri, Sumba og Hov) 23. januar 2025. Síðani tá hevur verið arbeitt við at skipa samstarvið millum partarnar, og prosjekteringin hevur verið í útboði.

Vinnari av útboðnum var Sp/f Formo á Glyvrum. Sáttmáli er gjørdur, og farið er undir forkanningar og staðfesting av vavinum av uppgávuni og projekteringi. Í næstum verður farið undir projekteringina. Ætlandi verður projekteringin liðug í august/september 2025, og síðani verður farið undir innboðið útboð av byggiarbeiðinum. Lisitatión verður ætlandi í oktober 2025 og síðani sáttmálagerð.

Svar til spurning 2:
Tá arbeiðstøkusáttmáli er gjørdur, ætlandi í oktober 2025, kann fyrireikandi arbeiðið setast í gongd, bíleggingar o.a. Sjálvt bygningsarbeiðið byrjar umleið 1. apríl 2026 og fer at taka umleið 6 mánaðir.

Almanna- og mentamálaráðið 24. juni 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður